## DAGSINS MEINING

# UG!

Tónleikafestivalarnir eru nú komnir fyri at vera verðandi. Triði og størsti tónleikafestivalurin, G! festivalurin, er nú av, og hann gjørdist sum væntað ein dundrandi succés – beint til UG! Frammanundan hava vit havt Jóansøkufestival á Tvøroyri og MJÚS festivalin á Sandi, sum eisini vóru framúr væleydnaðir. Eftir er Summarfestivalurin í Klaksvík, sum eftir øllum at døma – skulu vit ganga eftir stóru nøvnunum og søluni higartil - ikki fer at standa aftanfyri G festivalin. Umframt hesar festivalar hava vit havt fleiri onnur rútmisk tónleikatiltøk eins og vit hava havt tann væleydnaða klassiska festivalin Summarónar, síðnai Fólkatónleikarastevnuna og so eitt flott tiltak í Rituvík. Síðan koma ólavsøkukonsertin og Listastevnan við sera fjølbroyttum og dygdargóðum tónleikatilboðum til at kalla hvønns mans tykki.

Her hendir ómetaliga nógv á tónlistaøkinum í Føroyum - tað veri seg innan klassiskan eins væl og rútmiskan tónleik. Áhugin tey seinastu árini fyri tónleiki av øllum handa slagi er vaksin støðugt, og tilboðini gerast alt meira fjøltáttað og spennandi. Hetta er ein sera góð og jalig gongd, og vit eiga at vera fyrireikarunum sera takksom fyri hesi einastandandi tónleikatilboðini, sum tey megna at bjóða føroysku áhoyrarafjøldini. Tað liggur eitt ómetaliga stórt og tungt fyrireikingararbeiði aftan fyri hvørt einstakt tiltak. Nógv tað mesta av hesum arbeiði verður avrikað av sjálvboðnari og óløntari arbeiðsmegi. Alt verður avviklað professionell og effektivt á ein hátt, ið einki stendur aftan fyri tey mest professionellu tiltøk í útheiminum. Hetta tænir fyrireikarunum til æru.

Tað hevur stóran týding, at serstakliga tey ungu hava trygg, dygdargóð og vælskipað tónleikatiltøk at fara til. Hetta hevur stóran týdning fyri trivnaðin hjá ungum sum eldri, og tað er tí at vóna, at festivalarnir halda fram og støðugt mennast. Tónleikur, hann veri seg klassiskur so væl sum rútmiskur bindir fólk saman og skapar ein góðan felagskap, eitt felags mál. Tónleikarar og vælskipað tónleikatiltøk hava mennandi og upplívandi ávirkan á áhoyrarafjøld og á tónleikarar sjálvar. Tónleikaøkið er í støðugum vøkstri og í menning. Tað eru nógvar orsøkir til hesa gongd t.d. musikkskúlin, altjóðagerðingin og sjálvur tíðarandin. Tað ræður um at stimbra hesa menning og at geva tónleikalívinum góðar karmar. Hetta er primert ein uppgáva hjá landsmyndugleikum og kommunalum myndugleikum, men eisini skúlin og foreldur hava eina stóra ábyrgd her. Vit ynskja Summarfestivali og hinum komandi tónleikatiltøkunum, sum vit enn hava tilgóðar, góða eydnu. Nú hava vit so hoyrt og sæð og upplivað G! festivalin. Við hesum verður festivalfakkulin skjótt borin longur norður og yvir um Lorvíksfjørð. Góða eydnu til enn ein festival. Man kundi sagt tað stutt og greitt: KG avloysir G!.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er einskiljingartilgongdin broytt?

**Petur Holm**



Nú ein morgunin frættist, at hin almenni Føroya Grunnurin hevði selt 67% av partabrøvunum í JFK fyri 82 milliónir kr. Hetta er í veruleikanum startskotið til eina føroyska einskiljingartilgongd, og eg fari at ynskja keyparunum - Hanusi Hansen og Norðoya Sparikassa - tillukku og góða eydnu við keypinum og við, at teir á henda hátt hava sett skjøtil at hesa tilgongd, sum hevur bíðað so leingi.

Hátturin, sum hetta er gjørt uppá er eisini sera vanligur. Eitt management buy out. Leiðslan keypir meirilutan við eini kraftigari fígging í bakhondini. Frá keyparans síðu sær alt út til at hava gingið vanliga fyri seg, og harafturat hava hesir megnað at hildið kortini tætt at kroppinum, soleiðis at almenningurin ikki hevur fingið frænir at keypinum.

Men sæð sum ein lið í eini sera trekari og tungari einskiljingartilgongd vóru tað mong, sum gapaðu heldur leingi tá tíðindini bórust í ÚF hendan morgunin. Nú eru nakrir dagar farnir, og tað er framvegis trupult at síggja, hvat er so sermerkt við Føroya Grunninim í mun til t.d. Framtaksgrunnin ella Fíggingargrunnin, tá sølu av ognum viðvíkir.

Líknandi hevur verið roynt fyrr. Notio gav fyri tíð síðan eitt tilboð um keyp av Fiskavirking, og úrslitið av hesum gjørdist at ein tung, tíðarkrevjandi og kostnaðarmikil sølutilgongd fór í gongd, sum ikki gevur trygd fyri einum betri prísi fyri fyritøkuna. Tað frættist um eina roynd at gera eitt management buy out á Fiskasøluni. Hetta endaði við einum management bye bye.

Meldingarnar hava verið greiðar, men torrskildar, frá landsins leiðslu í sambandi við sølu av almennum fyritøkum. Og hesar meldingar hava eisini fata um tær fyritøkur, sum eru áttar av grunnum, sum bara óbeinleiðis eru undir almennari ávirkan. Sølurnar skulu vera gjøgnumskygdar - hvat tað so er. Prospektir skulu skrivast - uttan at man í flestu førum hevur gjørt sær far um hví, so er, og at hetta í nógvum førum ikki er neyðugt. Rættiprísurin skal fáast fyri fyritøkurnar - nakað sum ein ongantíð kann siga nakað um við vissu. Og sølurnar skulu helst fara um ein virðisbrævamarknað. Eftir mínum tykki mest meldingar, sum skulu geva landsins leiðslu meira tíð til at finna eitt stev viðvíkjandi einskiljingumartilgongdini.

Men, ok, hetta eru so spælireglarnir, og vit sum hava víst tilgongdini áhuga hava tilpassað okkum, og hava bíðað. Hendan seinasta (og fyrsta) sølan av eini almennari fyritøku er tí eitt sindir ørkymlandi. Merkir hetta, at tað einans í einstøkum førum er neyðugt at skriva prospekt? At tað ikki altíð er so umráðandi at tryggja rætta prísin? At gjøgnumskygni kann avmarkast til einstakar fyritøkur og at virðisbrævamarknaðin kann man brúka, tá stundir eru til tess?

Merkir hetta eisini, at ein søla kann avgreiðast skjótt og uttan politisk buzzwords, sum gjøgnumskygni, prospekt osfr., um talan bert er um rætta keyparan? Ella merkir tað, at einskiljingartilgongdin í veruleikanum er speeda munandi upp nú? At ein útlendskur banki t.d. kann keypa Føroya Banka í morgin, ella at føroyskir reiðarar kunnu keypa Fiskavirking á Ólavsøku, meðan onnur hyggja eftir kappróðri?

Eg haldi, at tað sum hendi í sambandi við søluna av JFK var sum so í lagið. Ein melding átti tó at komið, soleiðis at aðrir møguligir keyparar kundu bjóða seg fram í eina stutta tíð - t.d. tvær til fýra vikur. Á henda hátt kundi vissa í størri mun fingist fyri at hægst møguligi prísur fekst fyri fyritøkuna. Men eg haldi, at landsins leiðsla nú eigur at revurdera og melda greitt út, um einskiljingartilgongdin sum heild er broytt. Hon eigir eisini at innsíggja, at ein skilagóð søla av almennum fyritøkum kann gerast uttan alt hetta smarta hóvastákið, sum sermerkir verandi einskiljingartilgongd.




LEIGA AMBOÐ & MASKINUR

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.